VALGREINAR

# Mannarættindi – einans fyri tey sterkastu?

**Gunnar K Nattestad**
*Valevni Sambandsfloksins í Vágunum*



Mangan geva vit okkum ikki far um hvussu gott vit hava tað. Vit liva væl, hava tak yvir høvdið, ríkiligt at eta og kunna ferðast frítt. Vit hava rættin til persónligt frælsi m.a. at eiga okkara egna, kunna stórt sæð siga tað vit vilja og hava ikki fyri neyðini at finna okkum í at vera álopin ella hótt við lívinum. Jú, vit hava tað gott!

Men hava øll tað gott? Hvussu er við teimum ófødda, teimum ið eru brekaði og teimum ið liva í fátæku londunum? Nei, nógv av teimum hava tað als ikki gott.

Okkara rættarskipan skal eitast at tryggja at tann óseki ikki verður dømdur sekur. Men tá talan er um tey óføddu, kunna vit í praksis taka lívið av teimum inntil tey eru 12 vikur gomul. Vit ógvast tá vit hoyra um at fólk vera dømd til deyða, men hvat hugsa vit um at 10'tals av okkara egnu borgarum verða avlívað á hvørjum árið?

Skula vit snakka um hvør, ið er sekur og ikki, er neyvan yvi um, at barnið má vera eitt tað ósekasta vit kunna ímynda okkum. Hóast hettar, er tað mangan ófødda barni ið má gjalda við lívinum fyri foreldrana misstøk. Hvussu ber tað til at mannarættindini ikki røkka her? Hvat sigur m.a. AMNESTY til hetta?

Hvussu kunna somu fólk, ið berjast fyri at bjarga m.a. drápsmonnum frá deyðarevsing, samstundis heilhjartað tala fyri fríum fosturdrápi og enntá viðmæla hettar sum lið í bardaganum móti fólkavøkstri?

Vit hava ikki deyðarevsing í Føroyum sigst, men hvat mundu tey óføddu sagt um tey blivu spurd? Barnið við mongolismu, barnið ið er úrslit av eini neyðtøku ella barnið ið hevur foreldur ið verða metta at vera illa fyri, er í stóran mun óvart.

Ófødda barni kann einki siga, kann ikki tala sína søk, argumentera og mótmæla. Men er tað ikki júst her at MANNARÆTTINDINI koma inn í myndina, er tað ikki júst har tey veikastu hava sína verju?

Vanliga kallað vit tey ið tala søk teirra veiku fyri stríðsmenn, men hvussu er við teimum ið berjast fyri rættindi teirra óføddu. Tey vera vanliga kallað fanatikarar, kvinnu-niðurgerðarar og tað ið verri er.

Mín vón og ynski er at vit í Føroyum vilja geva okkara óføddu somu rættindi sum okkum ið eru fødd, so at tey ikki ein dag skula siga, "Tit tóku tykkum rætt til at velja um vit skuldu liva ella doyggja í móðurlívið, nú fara vit at avgera um tit skulu liva ella doyggja sum gomul". Ein ógvusligur takni, men hygg at hvussu veruleikin er, m.a. í Hollandi.

Lívið er ein menning frá gitnaði til deyða - men tað er líka nógv lív alla tíðina! Sjálvt um eingin sær nakað og rópini hoyrast ikki – so er lívið ið verður tikið hitt sama og deyðin er líka veruligur.

Lat okkum úr øllum flokkum standa saman um at verja lívið vit øll hava fingið frá Guði.

# Friður í okkara tíð

**Hans J. Hermansen**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Er nakar hugsjónarmaður eftir? Er nakar, sum saman við mær hevur hug til at royna at stovna eina altjóða friðarrørslu, ið sprettur úr fólkinum? Eina sonevnd "grasrótarrørslu".

Rørslan skal vera óbundin í allar mátar og ikki órógvast av nøkrum øðrum. Einasta málið er friður fyri øll.

Eg ivist ikki í, at meiri enn 99% av heimsins borgarum, ið hava ikki fólkaræði, lata seg kúga av minni enn 1%, sum situr við valdinum. Hvussu hetta prosentið hevur fingið valdið at kúga onnur, er ein annar spurningur.

Um vit, ið hava tað gott, orka ikki at fara undir tílíkt tiltak, hvussu skulu tey kúgaðu so orka?

Hyggið at støðuni úti í heimi: Skal framtíðin hjá okkum og okkara eftirkomarum síggja út, sum hon ger, uttan at vit hava lyft hond frá síðu?

Trúgv flytir fjøll. Ein langur gongutúrur byrjar altíð við fyrsta fetinum. Hetta verður ein langur túrur, um hann skal eyðnast og verður ikki avbrotin. Við orðunum hjá Chamberlain í huga, Peace in our time, verður farið til gongu, fyrst í Føroyum og seinri - vónandi - úti um heimin.

Um onkur er, sum er áhugaður at hjálpa mær við hesum, kann viðkomandi skriva til mín ella senda teldupost. Skipað verður fyri fundi, um undirtøka verður fyri hesum.

T-postur:
hajah@post.olivant.fo

# Skattalækking

**Annfinn Brekkstein**
*valevni sambandsflokksins í Suðurstreymoy*



Í einum ásannan av hesum veruleika vil undirritaði sum valevni sambandsflokksins stríðast fyri at minka um almenna partin av samfelagsbúskapinum. Í hesi stremban er og verður eitt av aðalmálum floksins at minka um tað alt og høga skatta- og avgjaldstrýstið, sum er galdandi í føroyska samfelagnum.

Tað er okkum til títlan sóma at varðveita ein marginalskatt uppá 58 % av seinast forvunnu upphæddini fyri vanligar meðalinntøkur, umframt at meirvirðisgjaldið er tað hægsta í Europa ájavnt tað danska og svenska.

Tað skal altíð loysa seg at arbeiða. Borgarin skal sostatt ongantíð revsast fíggjarliga fyri sín góða arbeiðshug. Fyri at stimbra og motivera tann einstaka eigur øll orka eitt komandi valskeið at vera løgd í at fáa skattin niður um 50 % seinast tjentu krónuni.

# Føroya Javnaðarflokkur sigur og meinar tað – FÓLKIÐ FYRST !

**Birgir Mohr**
*valevni Javnaðarfloksins í Sandoynni*



Heimarøktin skal útbyggjast við døgnrøktarskipan

Fleiri og fleiri eldri liggja einsamøll og óhjálpin heima, tá heimahjálpin fer eftir dagligu ella vikuligu vitjanina.

Tí vil Javnaðarflokkurin beinanvegin útbyggja heimarøktina við einari tilkalliskipan, fyri harvið at økja um tryggleikan og møguleikan at búgva og vera verandi í egnum heimi, hóast høgan aldur.

**Pensiónin skal upp**
Eingin einstaklingur skal við pensiónsaldur hava minni enn kr. 10.000,- um mánaðin í pensión - og hjúnarpør kr. 16.000,- tí eingin kann ídag halda hús og liva sámuliga fyri minni.

Fólkapensiónin og Samhaldsfasti eftirlønargrunnurin skulu tilsamans tryggja pensionistum hesar minstu upphæddir.

**Tey møguleikaskerdu**
Javnaðarflokkurin fer at seta viðurskiftini hjá fólki við skerdum møguleikum aftur á dagsskrá, eftir at hesi ikki hava verið raðfest politiskt seinastu árini.

Ítøkulig stig skulu takast at útvega og byggja bústaðir til sálarliga sjúk, menningar- og rørslutarnað fólk. Somuleiðis skal arbeiðsmarknaðurin gerast rúmari fyri hesum fólkum, soleiðis at lívsdygdin hækkar. Allir almennir bygningar eiga at vera gjørdir atkomuligir fyri rørslutarnað fólk.

**Heilsuverkið skal styrkjast**
Javnaðarflokkurin vil taka ítøkjulig stig at betra fólkaheilsuna, við at bjóða føroyingum fyribyrgjandi heilsukanningar til øll, og viðgerð móti misnýtslu av ymiskum skaðiligum slag.

Í sjúkrahúsverkinum skal tørvurin hjá sjúklinginum setast í hásæti, og somu heilsuligu tilboð skulu bjóðast um allar Føroyar, uttan mun til hvar ein býr. Støðið má vera sum tann frægasta tænastan í okkara grannalondum.

Hetta kostar pening. Javnaðarflokkurin vil raðfesta peningin á løgtingsfíggjarlógini, til frama fyri alt Føroya fólk - til lívsfrælsi - framum óveruligar tjóðskapardreymar og nationalismu.

Veljið Javnaðarflokkin

# Søgan um Stoltenberg var bluff

**Hans Pauli Strøm**
*javnaðartingmaður*



Hetta er yvirskriftin í heilsíðisgrein í nýggjasta FF-blaðnum, sum væl og virðiliga grundgevir fyri og dokumenterar, at tjóðveldistíðindini um at tann gitni norski politikarin Thorvald Stoltenberg arbeiddi fyri føroyska/grønlendska fullveldisbólkin í Fólkatinginum, "kunnu staðfestast sum ósannindi". Onkur hevur funnist at mær fyri at kallað hetta nummarið hjá tjóðveldinum fyri svindil. Tað er møguligt at "bluff" hjá FF-blaðnum er tað rættara orðið. Men týdningurin er nakað tann sami.



VALGREINAR

Ræðumyndaherferð:

# Støðgið tjóvinum, rópti tjóvurin

**Bergur P. Dam**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



**Tjóðveldisflokkurin er farin í valstríð við eini ræðumyndaherferð, har tey kasta øðrum fyri at vilja gera somu skaðagerðir, sum Tjóðveldisflokkurin sjálvur hevur gjørt**

Í politiskum útvarpslýsingum hevur Tjóðveldisflokkurin boðið til kafékvøld, har ávíst tema hevur verið á skránni.

**Kriminalpreventión**
Fyrsta reklaman, sum eg hoyrdi snúði seg um landskassan. Orðaljóðið var nakað sum "Hvussu forða vit hinum flokkunum at tøma landskassan?". Í hesi orðing er innbygd ein ákæra ímóti øllum hinu flokkunum, har teit verða skýrdir at verða kriminellir. Ein ákæra, sum ljóðar, at sleppa hinir flokkarnir, so aftra teir seg ikki at stjala av landskassanum. Ein ótrúliga grov ákæra. Ein markleysur frekleiki, sum helst stavar frá eini undirlutakenslu, sum er konverterað til stórheitsvanvit og sjálvsyvirmetan.

**"Ræni eg alt, kunnu hini ikki"**
Men kanska trúgva tey sjálvi hesum. Kanska hava tey sannført seg sjálvi um, at tað veruliga er so.

Kanska er hetta ein grund fyri politisku framferðini seinastu tíðina. Kanska er tað so at tjóðveldisumboðini hava hugsað sum so, at tryggasta háttur at forða stuldri, er at syrgja fyri, at onki er at ræna. Tí royndu tey at leggja alt so til rættis, at onki er í landskassanum at ræna hjá teimum sum taka yvir.

Fyrstu árini í samgongu brandskattaðu tey, hækkaðu blokkin til metstøði og løgdu alt til síðis. Henda uppsparing skuldi brúkast at propagandera fyri loysingini. Øll átrokandi málsøki blivu forsømd. Hóast bestu tíðir bleiv onki gjørt.

Men so – tá seinasta fíggjarlóg teirra skuldi gerast – vendist alt við. Væl vitandi, at tað, sum nú bleiv avgjørt, komu eftirfylgjararnir at skula fíggja, varð hol sett á.

Útreiðslur í milliardaklassa blivu samtyktar í evstu løtu, tá hurðin var um at bresta í eftir samgonguni. Samstundis bleiv ein triðingur av blokkinum í einum høgdur burtur.

Úrslitið: Samtykta fíggjarlógin í ár – tá eykajáttanir og nýggjar útreiðslur eru innroknaðar – fer at geva hall.

Eftir einum ári vendu tey einum yvirskoti uppá fleiri hundrað millónir til hall.

Og so var fullgjørt. Tí hvør kann ræna ein landskassa, sum longu er tømdur?

**Undirgrundarhandil**
Onnur lýsing snúðið seg um virðini í undirgrundini. Í lýsingini varð spurt, hvussu tey kunnu forða andstøðuni at avreiða ráevnini í undirgrundini. Aftur ein grov, ærumeiðandi ákæra innbygd í eina útvarpslýsing. Og aftur ein ákæra, har Tjóðveldisflokkurin ávarar ímóti at onnur kunnu finna uppá at gera tað sama, sum tey sjálvi hava gjørt.

Ikki nógv dømi eru um at so at siga alt politiska umhvørvið í Føroyum hevur staðið samt um eitt mál. Men málið um undirgrundina er slíkt dømi.

Allir flokkar í Føroyum hava hildið rimmarfast um, at møgulig virði í undirgrundini eru ogn Føroya Fólks og bara fólkið í Føroyum eigur at hava avgerðarrætt yvir hesum. Hetta var full semja um.

Til Tjóðveldisflokkurin, sum tann einasti, broytti kós, og bæði vildi lata onnur taka pant í møguligu virðunum og kunngjørdu, at tey ikki vóru samd í at vit hava ræði á hesum virðum.

Eftir at fleiri loysingarstrategiir vóru kollsigldar, kom rættuligur panikkur í Tjóðveldisflokkin. Í garvillari desperasjón bjóðaðu tey dønum pant í undirgrundini, um danir afturfyri vildu fíggja loysingina her og nú. So fast hevði fáfongdin fingið tøkur í teimum, at tey - og bara tey – vóru til reiðar at avreiða møgulig framtíðar virði í undirgrundini til danir.

**Hvat er at vænta?**
Av røttum kunnu vit spyrja, hvat tað næsta verður, sum tey vilja offrað á hesum forfongiligheitsaltari. Longu nú er ágangur fyri at lata út til spekulantar fólksins ognir – frá banka til veiðirættindi. Og Tjóðveldisflokkurin er sárbærur.

Bara Javnaðarflokkurin hevur sum stavnhald at verja fólksins ognir ímóti spekulantum. Bara Javnaðarflokkurin sigur kortanei at geva fólksins ognir upp til skutils fyri at fjálga einum loysingardreymi ella eini liberalismuillusjón. Tí mugu vit styrkja Javnaðarflokkin.

Ein sterkur Javnaðarflokkur er trygdin fyri at fólksins virði verða verandi fólksins virði.

# Ynskja vit framhaldandi at liva í einum framkomnum Føroyum

**- tá velja vit framhaldandi ríkisfelagsskap - sum Sambandsflokkurin vil virka fyri**

**Jákup Lamhauge**
*Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Løgtingsvalið hesaferð stendur meira enn nakrantíð áður um valið millum varðveitan av ríkisfelagsskapinum millum Føroyar, Danmark og Grønland, og so hinvegin um valið at slíta Føroyar úr ríkisfelagsskapinum.

Samgonguflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, hava í sínum valuppleggið til føroya fólki, gjørt greitt, at um teir aftur fáa meirilutan í løgtinginum, so verður hildið fram á somu leið sum seinastu fýra árini - nevniliga at slíta øll bond við 600-ára gamla ríkisfelagsskapin.

Stevna sjálvstýrisflokkana er ikki at taka feil av, og tí er tað so mikið meira umráðandi, at vit føroyingar eru á varðhaldi og leggja forðingar fyri ætlanum teirra. Hendan møguleika hava vit á valdegnum 30. apríl.

Veljarakanningarnar seinastu tíðina hava víst, at stórur meiriluti av føroyingum eru ímóti at slíta við ríkisfelagsskapin, og tað kunnu vit bert fegnast um, men løgtingsvalið hevur ikki verið enn, og tí er umráðandi, at vit halda fast um støðu okkara og ikke bert tað, men at vit hvør í sínum lagi gera sítt til, at valúrslitið verður eins gott og veljarakanningarnar higartil hava víst.

Øll mugu gera sær greitt, at talan er um eitt sera álvarsamt val - tí eru vit fyrst farin úr ríkisfelagsskapinum, so ber ikki til at venda aftur.

Tí verður enn einaferð rópt varskó til føroya fólk - stemmið í við Sambandsflokkinum, flokkinum sum vil tryggja vælferð og trivna í landinum.

# Frá Vestmanna til Tjørnuvíkar

**Ernst Kass**
*valevni Sjálvstýrisflokksins í Norðurstreymi*



Vit, sum hava okkara dagligu gongd í Norðurstreymi, noyðast at gera upp við okkum sjálvi, hvat vit vilja við valdømi okkara. Vit eiga at kunna koma saman og standa saman sum ein eind, til tess at øki okkara eisini framyvir kann taka lut í tí framburði og menning, sum føroyska samfelagið er merkt av.

So leingi vit ikki eru saman um at tala okkara søk - so leingi kemur søk okkara ikki at vera hoyrd.

Nú hava teir størri flokkanir í eitt mannaminni tala søkina hjá norðstreymoyingum á Løgtingið.

Er tað ikki uppá tíðina, at vit fáa eina broyting? Er tað ikki uppá tíðina, at Sjálvstýrisflokkurin gerst røddin hjá norðstreymoyingum á Føroya Løgtingið?

**Valstríð og lýftir**
Eins og tá ið jól eru í hondum, so verður tað í hesum døgum ynskt og lova frá øllum síðum;
tunnlar, skip, skattalættar, lønarhækkingar, sjúkrahús, os.fr. Men vit mugu ikki gloymað, at í síðsta enda eru tað vit sjálvi, sum skulu gjalda fyri allar jólagávurnar. Tað kemur ein dagur, tá ið øll vallyftini og allar rokningarnar skulu gjaldast. Vit í Sjálvstýrisflokkinum, ynskja ikki at Føroyar fara á heysin aftur.

Sjálvstýrisflokkurin ynskir at hyggja realistiskt uppá, hvat ið er best fyri land og fólk. Vit ynskja, at halda tað vit lova. Men tað verður ikki gjørt við at yvirbjóða okkara mótvalevnum, men tað verður við at lurtað eftir fólkinum.

**Broyting og menning**
Norðurstreymur hevur brúk fyri broyting og menning, og tað kunnu norðstreymoyingar fáa, um teir ynskja tað. Sjálvstýrisflokkurin er títt boð uppá eitt gott alternativ.

Tískil vil undirritaði heitað á allar Norðstreymoyingar - heilt frá Vestmanna til Tjørnuvíkar - um at fara á val 30.04-2002 og stemma uppá Sjálvstýrisflokkurin.

X við Sjálvstýrisflokkin - títt alternativ

Vitjið heimasíðu okkara: www.tingakrossur.fo

# Norðstreymoy sum miðdepil

**- Fiskivinnuskúlin í Vestmanna skal gerast besti ídnaðaskúli í Evropa**

**Olav Enomoto**
*valevni Sambandsflokksins í Norðstreymoy*

Fiskivinnuskúlin átti at verið mest týðandi miðnámsútbúgving í einum fiskivinnulandi. Her eiga vit tilfeingi og møguleikarnar. Fiskivinnan, ið er okkara høvðusvinna, hevur ein skúla ið fær minst pening av øllum skúlum. Hettar skal broytast sum skjótast.

Samstundis má eitt veruligt umhvørvi skapast um henda so neyðuga skúla.

Fiskirannsóknarstovan eigur at verða flutt úr Havn til Vestmanna. Sjálvandi átti havransøkarskipið Magnus Heinason at havt heimstað sína í bestu náttúruhavn í Føroyum. Sjálvandi skulu fiskastovnsgransking og komandi starvstova fyri fiskasjúkur liggja saman við einum møguligum komandi fiskivinnuhá skúla. Fiskivinnugransking og menning skal beina okkum á eitt hátøknuligt



støði, soleiðis at Føroyar sum land varveitur kappingarførið við umheimin.

Arbeiðast skal fram ímóti einum fiskivinnumiðdepli.

Tá tað ber til at ferðast úr Norðstreymi til Havnar hvønn morgun, skuldi tað eisini borið til at koyrt úr Havn til Vestmanna. Tað er bara ein spurningur um at fáa okkara áhugamál førd fram á tingi.